# Stórsligin móttøka á Strondum

MÓTTØKA
*Páll Holm Johannesen*

Eftir at FM-steyp og heiðursmerkir vórðu handaðið strandingum í høllini í Vestmanna, helt gleðisrúsurin fram á Strondum. Leygarkvøldið bjóðaði Sjóvar kommuna øllum STÌF-viðhaldsfólkum í bygdahúsið á Strondum at heiðra nýkosnu meistararnar.

Leikararnir komu inn á Strendur um átta-tíðina, og so var farið rundtúr ígjøgnum bygdina við føroyameistarunum, so ung sum gomul fingu høvi at heilsa FM-vinnararunum.

Eftir rundtúrin í bygdini, savnaðust strandingar í bygdarhúsinum til suppu. Av Strondum verður sagt at salurin var stúgvandi fullur. Eftir ábit var skipað fyri dansi í bygdahúsinum, og dansurin helt á til tann ljósan morgun.



*Leikarar og viðhaldsfólk hjá STÍF vóru koyrd í lastbil, og síðan varð koyrt runt í bygdini. Bilkøðin aftanfyri lastbilin segðist vera ein kilometur long*



*FM vinnararnir úr STÍF á veg inn í bygdahúsið, eftir túrin í bygdini*



*Ungu sum gomul viðhaldsfólk hjá nýggju FM-vinnararunum av Strondum høvdu leitað sær í bygdahúsið leygarkvøldið.*

# Ítróttarhøllin á Giljanesi karmur um nógv tiltøk á páskum

STUÐULSFELAGIÐ HJÁ FS-VÁGUM
*Tíðindaskriv*

Ítróttarhøllin á Giljanesi verður um páskirnar karmur um ymisk tiltøk. Fyriskipari er stuðulsfelagið hjá fótbóltsfelagnum FS-Vágum.

Páskaaftan, leygardagin 19. apríl kl. 15.00 verður stórt familjutiltak, har nógv ymiskt er á skránni, bæði fyri ung og gomul. Klovnurin Fjotti og gandakallurin Ásbjørn koma á vitjan, Óluvá Dam syngur og Sanna Akselsen fer at syngja saman við børnunum. Eisini verður tombola við bamsum, páskareggum, Restorff´s sodavatni og køkum. Harumframt er møguleiki at keypa sær okkurt lætt til matna og ein góðan kaffimunn við onkrum afturvið. Familjutiltakið er ein góður møguleiki hjá allari familjuni at hugna sær saman.

Páskaaftan kl. 20.00 verður stór gospelkonsert í ítróttarhøllini á Giljanesi. Bólkarnir sum eru við eru: I am, MMM, Chain og Bracket, so hetta lovar til eina góða konsert. Kostnaðurin fyri konsertina er 100,- kr.

2. páskakvøld 21. apríl kl. 24.00 verður stór rockkonsert, eisini í ítróttarhøllini á Giljanesi. Bólkarnir sum spæla til hesa konsertina eru: Mind´s eye, Flux, ROK og Fluffy toys, so her verður eisini góður tónleikur á skránni. Kostnaðurin fyri rockkonsertina er 120,- kr.

Í samband við rockkonsertina koyra bussar úr Fuglafirði, Leirvík, Tórshavn (City) og Vestmanna. Bussarnir koyra úr øllum støðunum kl. 22.30. Eisini koyra bussarnir heimaftur eftir konsertina.

Hesar konsertir skuldu verið eitt gott høvi hjá ungum og gomlum at notið góðan tónleik.

Øll eru vælkomin í ítróttarhøllina á Giljanesi um páskirnar.



# KÍ leitar eftir tendringini

**Bilsmiðurin í venjarastarvinum hevur ongantíð vitað, at áhugin fyri fótbóltsflaggskipinum í Klaksvík var so stórur, sum hann er**

KÍ Í TUNGUM SJÓGVI
*Jóannes Hansen*

Í morgin fær KÍ vitjan av VB. Mánadagin skal KÍ á Argir. Talan er um teir báðar síðstu dystirnar í bólkaspælinum í steypakappinginI. Í fjør megnaðu klaksvíkingar ikki at spæla seg víðari úr bólkaumfarinum. Og tað er møguleiki fyri somu útgongd úr bólkaspælinum í ár.

Aðra staðni verður tosað og mett um, hvør venjari fer at verða tann fyrsti at missa høvdið. Eitt nú í Danmark verður veddað um, hvør fer at verða fyrst uppsagdur. Um tað skal dømast út frá úrslitunum higartil í steypakappingini, so kundi hugsast, at nýggi KÍ venjarin, Jan Joensen, situr eitt sindur leysur í saðlinum. Men hetta sigur hann seg ikki hugsað um:

– Eg havi spælt við besta KÍ liðnum í meiri enn helmingin av mínum lívi. Eg havi altíð vitað, at áhugin fyri fótbólti í Klaksvík hevur verið stórur. Hetta er fyrsta árið, at eg eri venjari, og eg má siga, at eg havi ongantíð vitað, at áhugin er so stórur, sum hann er. Tað ørkymlar her norðuri, at tað higartil ikki hevur gingið so væl í steypakappingini. Tey, sum vilja tosa um fótbólt og KÍ, uppmuntra meg og spælararnar. Tað kann vera, at okkurt verður tutlað í krókunum, sum eg av góðum grundum ikki hoyri nakað um. Men sjálvur hugsi eg ikki um uppsøgn og at missa høvdið. Leiðslan hevur víst okkum álit, og vit arbeiða so nógv og væl, sum vit evna, og vit rokna við, at tað fer at bera til.



*Venjarin í KÍ, Jan Joensen, er ikki bangin fyri at missa høvdið, hóast úrslitini higartil ikki hava verið av teimum bestu hjá KÍ.*
*Mynd: Savnsmynd*

## Treytirnar

Undan VB vitjanini og ferðini á Argir er tað púra greitt fyri Jan Joensen og hansara monnum, hvat skal til fyri at halda fram í steypakappingini:

– Treytin er, at vit mugu vinna øll seks stigini. Tað verður torført, men tað eigur at bera til. Í fjør kom tað óvæntað, at vit ikki megnaðu at spæla okkum víðari úr bólkaumfarinum. Tá ið vit nú hava ta royndina, eiga vit ikki at verða tiknir av fótum. Men vit mugu ásanna, at tað higartil ikki hevur gingið, sum vit høvdu vónað, og sum eg haldi, at vit kunnu rokna við, at tað skal ganga hjá KÍ.

Týsdagin fylti Jan Joensen 35 ár. Tá vóru allir spælararnir heima hjá Duritu og honum undir Brúnni og fingu sær ein drekkamunn. Einki er at ivast í, at nógv av prátinum snúði seg um fótbólt.

– Vit venja nógv og spælararnir vísa áhuga og leggja nógv fyri. Um vit siga, at dystirnir eru próvtøkurnar, so mugu vit siga, at úrslitini hava als ikki verið nóg góð. Og vit eru heldur ikki so ósamdir í, at høvuðsorsøkin hevur verið, at vit hava ikki verið nóg sannførandi í arbeiðnum. Spælararnir hava ikki verið nóg tendraðir til avbjóðingarnar. Tað mugu teir vera. Munurin á liðunum er so mikið lítil, at tað skal arbeiðast hundrað prosent. Annars gongur tað ikki. Allir eru greiðir, at neistin skal vera betri, enn hann hevur verið, sigur bilsmiðurin í KÍ venjara sessinum.

## Meiri varnir

Tá ið Jan Joensen gjørdist KÍ venjari, fjaldi hann ikki dreymin um, at KÍ skuldi verða meiri spælstýrandi, enn teir hava verið undanfarnu árini.

– Tá ið vit vunnu FM í 1991 og aftur í 1999, var útgangsstøðan tann, at vit fóru á vøllin at verja tað, sum vit høvdu, og so dúvaðu vit upp á møguleikan at fáa eitt ella tvey mál í skjótum álopum. Eg haldi, at tað er hugaligari at seta seg á spælið, royna eitt tvey samanspæl og at fáa vongverjarnar við í framrættaða partin. Hetta gekk væl í Klaksvíkskappingini, tá ið eg haldi, at vit megnaðu at spæla okkum til sigur á HB, og tað gekk væl í fleiri venjingardystum. Men eg má ásanna, at gongdin higartil í steypakappingin hevur við sær, at vit hugsa um ikki at vera heilt so avgjørdir í hesum, sum vit hava verið higartil.

Tit ætla altso at broyta spælistíl, nú tað resta tvey umfør av bólkaspælinum?

– Vit ætla ikki at broyta spælistíl. Men vit ætla at gera onkrar tillagingar soleiðis, at tað verður størri dentur lagdur á verjupartin, enn tað hevur verið. Ein onnur broyting er, at eg eri givin at spæla. Tær seinastu vikurnar havi eg vant við og spælt á miðvøllinum. Soleiðis verður tað ikki meiri. Hjá onkrum ber tað til at vera spælandi venjari. Royndirnar hjá mær eru, at tað ber ikki til hjá mær. Tí verði eg á beinkinum, og eg haldi, at vit eiga spælararnar at røkja uppgávurnar. Fyrstu avbjóðingarnar eru nú hósdagin og mánadagin. Fyrsti landskappingardysturin verður í Gøtu. Tað er í hesum trimum dystunum, at vit skulu prógva, at vit hava funnið tendringina, sigur Jan Joensen.

# IM-normurin fjarar burtur

**Komandi dagarnir skulu føroysku telvararnir rættiliga bíta frá sær, um teir skulu hava møguleika at ogna sær IM-norm.**

TALV
*Páll Holm Johannesen*

FM fyri einstaklingar í talvi byrjaði leygardagin í Læraraskúlahøllini. Kappingin er øðrvísi skipað í ár, enn undanfarin ár. Sum nakað nýtt eru seks útlendskir telvarar bodnir við til kappingina í ár.

Eitt av endamálaunum við at hava útlendingar við í kappingini, er at økja um møguleikarnar hjá føroyingunum at tryggja sær ein IM-norm.

Eftir fýra umfør eru telvað av kappingini, sær tað heldur dapurt út, hvat IM-normi viðvíkur. Vanliga verður mett, at fyri at tryggja sær IM-norm, er kravið at fáa um tveir triðingar av møguligu stigunum í kappingini.

Hóast kappingin ikki er meir enn hálvrunnin, so bendir nógv á, at føroyingarnir fara gerast ov stuttir. Føroysku telvararnir hava mist nógv í fýra teimum fyrstu umførunum, og tí verður tað torført at røkka tí málinum.

Ikki hevur hilnast væl ímóti teimum útlendsku telvararunum, og júst talvini ímóti teimum eru avgerandi fyri IM-normarnar, so henda gongd skal vendast.

Í løtuni liggja teir báðir hægst styrkismettu, John Shaw og Kim Pilgaard, á odda í kappingini við trimum stigum. Fremstu føroyingarnar eru Heini Olsen og føroyameistarin í fjør, Hans Kristian Simonsen, sum báðir hava hálvtriðja stig.



*Møguleikarnir hjá føroysku telvararunum at fáa IM-norm í FM-kappingini í ár fjara burtur. Tað hevur ikki gingið heilt eftir vild hjá føroysku telvararunum í teimum fyrstu fýra umførunum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Styttri umhugsunartíð

Talvsamband Føroya hevur valt til FM-kappingina í ár at broyta umhugsunartíðina hjá telvarunum. Altjóða talvsambandið hevur ásett nýggjar reglur, og tær hevur Talvsamband Føroya tikið til sín.

Telvarar hava styttri tíð at umráða seg í, og tað havt við sær skjótari telving. Vanliga hava talvini ligið á 6-7 tímum, meðan til FM-kappingina hava talvini verið um 3-4 tímar.

## FM 2003 Atlantic Airways Cup

### Samlaða støðan eftir fàra umfær

| Landsliðsbólkurin | Rating | Stig |
|---|---|---|
| John Shaw | 2474 | 3 |
| Kim Pilgaard | 2440 | 3 |
| Eirik Gullaksen | 2354 | 3 |
| Saevar Bjarnason | 2258 | 3 |
| Heini Olsen | 2278 | 2,5 |
| Hans Kristian Simonsen | 2224 | 2,5 |
| Martin Poulsen | 2239 | 2 |
| Eyðun Nolsøe | 2220 | 2 |
| Carl Eli N. Samuelsen | 2142 | 2 |
| Joan Hendrik Andreasen | 2106 | 2 |
| Christan Jepson | 2412 | 1,5 |
| Flóvin Tór Næs | 2324 | 1,5 |
| Ólavur Simonsen | 2250 | 1,5 |
| Heikki Westerinen | 2360 | 1 |
| Torbjørn Thomsen | 2212 | 1 |
| Finnbjørn Vang | 2006 | 0,5 |